# ving í Føroyum?

**onkursvegna fáa avleiðingar, eru blaðstjórarnir Ingi Samuelsen og Jan Müller, di sjónvarpsstjórin Árni Gregersen samdir um.**




frá danska Undirvísingarmálaráðnum, sum tók endaligu avgerðina um at strika sersømdirnar hjá føroyskum umsøkjarum.

# Eftirútbúgving á Setrinum

**- Vit mugu hava útbúgvið fólk, tí sum nú er, eru tað bløðini sum útbúgva journalistar til teir almennu miðlarnar, sigur Ingi Samuelsen, ið heldur, at tað er týdningarmikið at nema sær útbúging uttanlands**

FJØLMIÐLAR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



Ingi Samuelsen, ábyrgdarblaðstjóri á Dimmalætting, heldur, at tað kann fáa keðiligar avleiðingar, um føroyingar ikki fáa útbúgvið fólk innan tíðindayrkið.

- Vit mugu hava útbúgvið fólk, tí sum nú er, eru tað bløðini sum útbúgva journalistar til teir almennu miðlarnar, sigur Ingi Samuelsen og leggur afturat, at tað hava bløðini sum privat partafeløg ikki ráð til.

### Eftirútbúgving

Blaðstjórin á Dimmu heldur, at best hevði verið, um føroyingar høvdu varðveitt bæði plássini á Danmarks Journalisthøjskole í Århus, tí hann vil avgjørt viðmæla føryskum tíðindafólki, at útbúgva seg uttanlands, og minnir á, at tað finnast fleiri lærustovnar, ið bjóða útbúgvingar innan journalistikk.

Ingi Samuelsen sigur, at ein føroysk útbúgving er næstbesta loysnin, og heldur, at ein útbúgving í Føroyum kundi verið eitt slag av eftirútbúgving hjá t.d. akademikarum, ið kundi vart eitt hálvt ár og verið hildin á Fróðskaparsetrinum.

Ingi Samuelsen metir, at helst eru føroyskir journalistar uttanlands, ið ikki eru komnir heimaftur.

### Samfelagsgagn

Spurdur, hvat hann heldur um, at útbúnir journalistar eru farnir í størv í t.d. peningatsovnum, er hann avgjørdur:

- Tað er keðiligt, tí tað hevði helst verið meira samfelagsgagnligt, um teir brúktu sítt fak, sigur Ingi Samuelsen, og kallar hetta eitt slag av spindoktarum.

- Men hetta er aftir ein spurningur pengar, og har hava vit ongan kjans at vera við, sigur blaðstjórin.

Spurdur, um hetta kann kallast ein trupulleiki fyri fólkaræðið, sigur Ingi Samuelsen, at um fleiri útbúnir journalistar høvdu verið, høvdu fjølmiðlarnir havt tað betri, og so so hevði demokratiið eisini havt tað betri.

Hann sigur at tilgongdin av útbúnum fólki er lítil, og heldur, at onkrar av orsøkunum kunnu vera, at størvini á bløðunum kundu verið meira spennandi, og at tað krevst meira av fólki har enn á teimum almennu miðlunum, har framleiðlan neyvan er so stór hjá hvørjum einstøkum fólki, sum hon er hjá teimum á bløðunum. Á bløðunum skal tilfarið altíð vera nýtt, og tú kanst ikki "endursenda" sum í loftmiðlunum, minnir Ingi Samuelsen á.

# Tann samfelagsligi og málsligi parturin kunnu takast í Føroyum

**- Hetta er eitt afturstig, sigur Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum, nú føroyingar ikki longur eiga tvey pláss á Journalistháskúlanum í Århus. Hinvegin heldur hann, at okkurt gott eisini kann spyrjast burtur úr støðuni**



FJØLMIÐLAR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

- Tað er sera óheppið, at danir hava tikið hesa støðuna, sigur Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum, um avgerðina hjá danska undirvísingarmálaráðnum at strika tey bæði plássini hjá føroyingum á Journalistháskúlanum. Hann heldur ikki, at danir kunnu koyra okkum "í ein pott" saman við øðrum minnilutum, og heldur, at danir hava eina skyldu at veita okkum pláss, av tí at eingin slíkur skúli er í Føroyum, og tí at uppgávurnar til upptøkuroyndina snúgva seg um donsk viðurskifti.

- Hetta er eitt afturstig.

- Eingin veit so væl sum vit á Sosialinum, at tað er trupult at fáa útbúnar journalistar, sigur Jan Müller, ið heldur, at møguligar orsøkir til hetta kunnu vera, at lønin er hægri í t.d. Danmark, og at arbeiðsviðusrskiftini á bløðum í Danmark kunnu vera betri, við m.a. at tað ikki verður kravt eins nógv av hvørjum einstøkum blaðfólki.

Hinvegin metir Jan Müller, at Sosialurin hevur verið heppin, tá tað ræður um at fáa fólk, m.o. dugnaligar studentar úr Hoydølum, og eitt positivt árin av hesum er, at fleiri av hesum hava fingið hug at útbúgva seg sum journalistar.

- Vit hava sett fleiri við, sigur blaðstjórin.

Jan Müller heldur, at tað var ótruliga spell, at Jógvan á Lakjuni ikki visti av, at plássini vórðu strikað, tí so kundi landsstýrismaðurin reagerað.

- Mær lysti at vitað, um danska undirvísingarskipanin hevur boðað frá hesum, sigur blaðstjórin, sum heldur, at vit mugu fáa danir at skilja, at vit hava tørv á hesum, so leingi vit ikki hava okkara egnu útbúgving.

### Samstarv

Jan Müller leggur tó stóran dent, at tað ber eisini til at síggja tað jaliga í tí nýggju støðuni, føroyingar eru komin í.

- Vit mugu ikki grenja, men heldur síggja, hvussu tingini kunnu gerast betri, sigur Jan Müller, ið heldur at hetta kann geva okkum skumpið rætta vegin.

Blaðstjórin metir, at tað hevði verið ein møguleiki gjørt eina kombinatión, har Fróðskaparsetrið og Danmarks Journalisthøjskole gjørdu eitt samstarv, har eitt nú lærarar haðani komu til Føroya. M.a. kundi verið undirvíst í samfelagsviðurskiftum og tí málsliga partinum í Føroyum, og so kundu lærarar av journalistháskúlanum ind-irvíst í tí journalistiska "handverkinum".

Umframt at siga, at tað er týdningarmikið, at føroyingar eisini útbúgva seg uttanlands, so sigur Jan Müller eisini, at tann málsliga parturin ikki skal undirmetast, og tí er gott at fáa júst Fróðskaparsetrið uppí.

Jan Müller heldur, at tveir journalistar um árið ikki nøktaði tørvin hjá føroyingum, og tí skal nýggja støðan eisini síggjast sum ein møgueiki sum nakað gott, og sum kann seta okkur tí gongd.

Hann metir, at tað helst hevði verið trupult at fingið politikarar at tikið undir við at byrjað ein nýggjan stovn ella okkurt líknandi, tí tað hevði helst verið ov dýrt. Hinvegin høvdu helst allir flokkar kunnað tikið undir við einum leisti, har samstarvað varð við lærustovnar uttanlands. Jan Müller metir, at nú nýggjar lógir eru komnar fyri kringvarp og fjølmiðlaábyrgd, er neyðugt at skapa góðar karmar, og at hyggja inn í kjarnuna, tí okkum tørvar útbúnar journalistar í Føroyum, staðfestir hann.

### Bløð, stovnar og loftmiðlar

Jan Müller sigur seg væl skilja, at nógv tíðindafólk fara til loftmiðlarnar heldur enn á bløðini, tí sum hann sigur, so er tað spennandi arbeiði at vera har.

Hann staðfestir eisini, at fleiri privatir og almennir stovnar seta journalistar sum kunningarfólk.

- Hetta noyðast vit at ásanna, og so er at vóna, at tey gera sítt arbeiði ordiligt, sum hann tekur til.

- T. d. átti Landsstýrið fyri langari tíð síðani at sett tíðindafólk, men hinvegin ger tað tað verri hjá okkum at fáa útbúgvið fólk, sigur Jan Müller um kappingina frá slíkum stovnum.